## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Konfirmantar í Havnar kirkju í 1954



*Konfirmantar tann 3. oktober 1954 í Havnar kirkju.*

*Vit ynskja øllum, og teimum sum vanta á myndini, eini gleðilig jól.*

# Rás2 fimm ár




*Starvsfólkini hjá Rás2, f.v: Sonne Smith, Ingi P. Jacobsen, Beinta Olsen, Ronny Petursson og Petur Jacobsen.*
*Mynd: Sunleiv Højgaard*

**Í dag, týsdagin 14. desember kl. 12, eru liðin fimm ár síðan Rás2 fyrstu ferð fór í luftina**

Rás2 byrjaði sum ein nýggj radiostøð við nýggjari útgerð, í somu hølum sum Atlantic Radio áður hevði hildið til, við Hoyvíksvegin í Havn.

Í februar 2004 flutti radiostøðin til Søldarfirðar.

Fimm fólk eru í heiltíðarstarvi umframt eini 15 sum arbeiða freelance.

Sum útvarpsstøð dekkar Rás2 í dag so gott sum alt landið.

Tíðindini verða gjørd og lisin á Sosialinum á Argjum.

Starvsfólkini á Rás2 ynskja øllum lurtarum og lýsarum eini gleðilig jól og takka fyri gott samstarv.